# Seinasti valsurin

**Undan seinastu uppgávuni við føroyska landsliðnum vónar Henrik Larsen, at dysturin kann seta eitt flott punktum fyri nøkrum góðum árum saman við føroyska fótbóltslandsliðnum**

VENJARIN
*Jákup Mørk*




*Í nógva hitanum hósdagin fingu spælararnir veruliga at kenna, hvussu ómenniskjansliga heitt tað kann verða. Men leygarkvøldið verður tann trupulleikin tó nakað minni, staðfestir Henrik Larsen*

**Tel Aviv, Ísrael:** Talan er um seinastu uppgávuna hjá Henrik Larsen sum landsliðsvenjara, tá Føroyar leygarkvøldið fara á vøllin. Og hóast venjaran sum so hevur góðtikið veruleikan, sum hann nú einaferð, so ásannaði hann, at tað var eitt sindur trist, at hesin kapittulin í venjaraskeiðnum nú er um at vera av.

- Sjálvandi er tað við eitt sindur av sorgblídni, at vit fara undir hesa uppgávuna, men soleiðis er tað.

- Men sum heild haldi eg, at dreingirnir hava verið ótrúliga góðir at arbeitt við, og leikliga haldi eg eisini, at vit eru komnir eitt fitt petti á leiðini. Hinvegin - og tað havi eg sagt fleiri ferðir - so hava úrslitini ikki verið heilt so góð, sum vit høvdu vónað. Men vit hava alla tíðina verið sera nær við, so alt í alt haldi eg, at eg kann illa vera annað enn væl nøgdur. Eisini við alt tað, sum er kring landsliðið við læknum, fysioterapeutum, liðleiðarum og øðrum. So hjá mær hevur hetta verið ein sera góð tíð.

## Trýstið er á Ísrael

Sum Henrik sjálvur sigur, so hevur tað oftani verið heilt nær við hjá føroyska liðnum, men enn hevur stóra sensatiónin tó latið bíða eftir sær. Besta úrslitið í so máta kom helst í fyrsta undankappingardystinum við stóra danan-um, og spurningurin er so, um vit eisini fáa okkurt óvæntað nú at enda.

- Tað verður sjálvandi ein ótrúliga trupul dystur, men sjálvandi vóna vit, at vit kunnu fáa eitt gott úrslit. Men tú skalt altso minnast til, at teir enn ikki hava tapt nakran dyst í undankappingini, so hatta er eitt sera trupult lið at hitta. Ikki minst er talan um imponerandi úrslit hjá teimum, tá tú hyggur at, hvørji lond eru við í okkara bólki.

Í ísraelsku miðlunum verður tosað um, at dysturin helst skal vinnast við minst seks málum. Er tað ikki nakað, sum kann telja til okkara fyrimun?

- Sjálvandi liggur nógv trýst á liðnum í so máta, og skulu teir halda fast í sínum møguleika, so skulu teir vinna stórt. Men eg rokni ikki við, at teir koma við fullari ferð frá fyrsta bríksli. Heldur vænti eg, at teir royna at stýra dystinum heim, og so vóna teir helst, at teir móti endanum kunnu fáa nøkur løtt mál, tá okkara lið fellur saman. Men tað eri eg vísur í, fer ikki at henda, helt venjarin.

## Venjingin er tað týdninarmesta

Hetta seinasta tykist Henrik eisini byggja á, at føroysku spælararnir tykjast vera sera væl fyri. Eisini hóast fleiri av teimum ikki hava havt so øgiliga nógva spælitíð í seinastuni. Nakað sum venjarin tó ikki sær tann heilt stóra trupulleikan í.

- Hyggur tú at ymsum landsliðum runt Europa, so er tað altso ikki alla staðni, at spælararnir eru fastir menn á sínum liðum. Tað týdningarmesta í so máta er, at teir hvønn dag fáa góða og harða venjing, soleiðis at venjingarstøðan verður hildin við líka, og teir ikki eru skaddir. Tá haldi eg, at teir spælarar, sum vit hava í hópinum hava allir bæði teknikk, fysikk og taktiskt medvit, soleiðis at teir eisini eru klárir at spæla ein krevjandi landsdyst.

- Sjálvandi er tað best, um teir eru fastir menn hjá teimum feløgum, sum teir umboða. Men Føroyar eru somikið lítlar, at vit eru noydd at góðtaka, at soleiðis hanga tingini ikki altíð saman. Men sjálvur haldi eg altso, at hópurin, sum vit í dag hava, er væl fyri.

*Tað skal hann helst eisini vera, um tit skulu spæla í slíkum hita?*

- Ja. Í dag (hósdagin, blðm.) løgdu vit venjingina seint fyrrapartin, og í so máta eru umstøðurnar betri, tá vit skulu spæla leygarkvøldið. Men nú vita spælararnir, hvussu ógvusligur hitin kann verða, og so mugu vit bara vóna, at tað verður nakað frægari til dystin. Tú sært eisini í dag, at fleiri kiksarar koma fyri, enn tað gjørdu til venjingina í gjár, og tað er orsakað av hitanum, sum ger, at tað er trupult hjá spælarunum at halda høvdinum kalt alla tíðina.

Men tí ringasta partinum av hesum skuldu tit væl sloppið undan, nú dysturin er um kvøldið.

- Ja, tað er sum so rætt, og tað haldi eg eisini, at vit sóu á Kypros í fjør. Sjálvandi var tað eisini heitt, tá vit spældu um kvøldið, men í mun til tær venjingar, sum vit høvdu havt, so megnaðu spælararnir nógv betri at spæla skilagott, og eg rokni við, at tað verður nakað av tí sama hesaferð, staðfesti Henrik Larsen at enda.



*Eftir at leikbann helt honum burturi frá seinasta dupult-umfarinum á lan*
*standa til eitt pláss milllum teir fyrstu ellivu leygardagin*

# Vitjaðu Dávids stað

Hósdagin var føroyski landsliðshópurin á rundferð í Jerusalem.

Serliga fyrstu árini var talan um nógvar útferðir, tá vitjað varð kring alt Europa, men við tíðini er spenningurin við hesum sum so minkaður nakað.

Men í Ísrael var spenningurin aftur í hæddini. At vitja ein somikið søguligan bý, sum Jerusalem er, er jú ikki hvørjum manni beskorið, og tey flestu í ferðalagnum munnu eisini ivast í, nær tey fáa ein slíkan møguleika aftur.

Beint eftir hósdagsvenjingina varð so koyrt til heilaga býin. Vitjað var á Golgata, har Jesus varð krossfestur, eins og grøvin sjálvandi varð vitjað. Eftirfylgjandi varð spákað eftir via Dolorosa, har Jesus sjálvur gekk við krossinum.

Og sjálvandi endaði ferðin við Grátimúrin, har túsundtals jødar hvønn dag biðja til Gud á staðnum, har teir siga anda hansara vera sterkastur.

## Óførir handilsmenn

Á ferðini varð sjálvandi eisini møguleiki at keypa sær okkurt tinganest heim við sær, og her mátti ferðalagið skjótt ásanna, at tað ikki er av ongum, at jødar eru tiltiknir góðir handilsmenn.

Alt fyri eitt, sum komið varð inn í handilin, har vit høvdu gjørt av at steðga á, vóru boðini, at nú talan var um so fína vitjan, var alt í handlinum til sølu fyri helvtarprís.

Tað gav at bíta, tá ein í ferðalagnum fór at tingast um ein lut, har prísurin var settur til 120 sheklar, sum er lokala gjaldoyra. Alt fyri eitt varð sett niður á 60, og